# RAKSTRAREGLUR FYRI GISTINGARHÚS O.T.

**Brunaumsjón landsins**

Desember 1998.

# Rakstrarreglur fyri gistingarhús o.t.

Hesar ásetingar eru settar við heimild í § 22 í løgtingslóg nr. 78 frá 12. juni 1986 og fevna um bygningar og gistingardeildir, ið rúma fleiri enn 10 sovi- ella seingjarplássum, og stovnar, har rørslutarnað kunnu koma.

## 1 Greiningar

1.1 Gistingarhús o.t.: Hotell, vistarheim, hús við smáíbúðum, frítíðartilhald, kostskúlar o.t. - og stovnar fyri brekað, hvíldarheim, røktarheim, ellisheim og tílíkir stovnar.

1.2 Sovikamar: Høli við seingjarplássi, eisini hjá starvsfólki.

1.3. Gistingardeild: Partur av bygningi við einum ella fleiri kømurum við gongum, goymslum og øðrum hølum, ið beinleiðis eru knýtt at tí ávísu gistingardeildini, íroknað høli og kømur til starvsfólk.
Tvær ella fleiri kamarsdeildir við felags rýmingarleið skulu roknast sum ein deild.

1.4 Føst vaktarskipan: Vaktarrúm í einari hædd, mannað alt samdøgrið.

## 2 Alment

2.1 Tann, ið hevur dagligu ábyrgdina, hevur eisini ábyrgdina av, at hesar rakstrarreglur verða hildnar.

2.2 Matstovur, kantinur, veitsluhøli og onnur samkomuhøli til fleiri enn 150 fólk við rýmingarleiðum, sum eru knýttar at hølinum, koma undir ásetingar fyri samkomuhús.

2.3 Alment tilgongd støð samb. punkt 1.1 skulu gerast og haldast við fyriliti til tryggleika hjá eldri fólki, sjónveikum og rørslutarnaðum.

## 3 ÚT- og neyðljós

3.1 Í gistingarhúsum, har krav er um ÚT- og neyðljós, skal vera starvsfólk, ið hevur fullan kunnleika um el-inleggingina, og hvussu hon verður handfarin, viðlíkahildin og roynd.

3.2 Næst stýritalvuni fyri ÚT- og neyðljósum skal ein vegleiðing, ið nágreiniliga greiðir frá skipanini, vera uppsligin. Har skal standa, hvussu hon virkar, hvussu hon skal brúkast og hvussu hon skal roynast og haldast viðlíka.
Sí punktini 6.2.5, 6.2.6, 7.1 og 7.4.

# 4 Ávaringarskipan

**4.1 Alment.**

4.1.1 Í forhøll, vaktarrúmi o.t. rúmum á gistingarhúsum, ið hava sovorðna skipan, skal hanga ein góðkend ávaringarskipan, ið svarar til bæði bygningin, ta veruligu nýtsluna og ávaringaranleggið, t.d. sambært 4.2.1 og 4.2.2. Vegleiðingin skal vera í samsvari við umstøðurnar á staðnum, og hon skal vera skrivað í skilabestu og gagnligastu raðfylgjuni.

a) Sløkkiliðið skal tilkallast (tilkallingarháttur skal tilskilast).
b) Innanhýsis alarmering skal setast í verk, har ávaringarskipanin ikki longu er farin í gongd, sí tó 4.2.1.
c) Seta í gongd bjarging og sløkking.
d) Skipað fyri móttøku av sløkkiliðinum við kunning um, hvar eldur er í og tal av fólki, sum ikki eru komin út.

Í førum har t.d. punktini a) og b) kunnu útinnast samstundis, skal hetta vera lýst í ávaringarvegleiðingini.

4.1.2 Brek í ávaringarskipanini skulu umvælast beinan vegin.

4.1.3 Skáp til høvuðskontaktir og/ella gruppuavbrótarar skulu standa læst. Einki óviðkomandi má vera í tílíkum skápi.

4.1.4 Víst verður umframt til punkt 7.1.

**4.2 Stovnar fyri brekað.**

4.2.1 *Á stovnum við ávaringarskipan, útgjørd við samtaluanleggi millum vaktarrúm og sovikømrini, skal fráboðanin, sum nevnd er í 4.1. b, vera givin bæði við ávaringarklokkum og munnligari vegleiðing gjøgnum samtaluskipanina, ella á annan nøktandi hátt.*
*Á stovnum við ávaringarskipan einans til starvsfólkið (t.d. eins og sjálvvirkandi brunaávaringarskipan, sum lýst í punkt 4.2.2), skal punkt 4.1.1. a og b orðast samsvarandi veruligu umstøðunum.*

4.2.2 *Á sovideildum skal vera sjálvvirkandi brunaávaringarskipan eins og lýst í 4.2.3.*

4.2.3 *Sjálvvirkandi brunaávaringarskipan skal gerast, eftirkannast og haldast viðlíka eftir Reglugerð fyri Sjálvvirkandi Brunaávaringarskipan frá Brunaumsjón landsins 1. januar 1998.*
*Í rýmingarleiðum, gongum og trappurúmum skulu roykvarnarar vera, og í øðrum rúmum hitavarnarar. Ávaringar, sum fara í gongd, skulu fara til øll vaktarrúm og til starvsfólkadeildina á stovninum. Á stovnum við sjálvvirkandi sprinklaraverju kann krav um hitavarnarar verða fráfallið.*
*Sjálvvirkandi brunaávaringarskipan skal hava beinleiðis fráboðan til vaktarstovuna hjá sløkkiliðinum, ið er mannað alt samdøgrið.*

## 5 Sløkkiútbúnaður

5.1 Á sovideildum skal á høgligum stað vera slanguskáp, ið er sett til vatnveitingarkervið, eins og ásett í punkti 23.2.-4 í KBB 92.

5.2 Slanguskáp skulu vera sett soleiðis, at tað frá tilvildarligum staði ikki er longri enn 25 m til næsta skáp.
Sløkkiútbúnaður skal setast næst atkomuvegnum í brunadeildini og soleiðis, at tað ikki minkar um breiddina ella á annan hátt forðar í rýmingarleiðini.

5.3 Í køkum til veruliga matgerð skal næst útgongdini vera í minsta lagi 1 hondeldsløkkjari eins og lýst í punkti 5.7. Eisini skal eitt sløkkiteppi hanga á vegginum. Har friturekókari ella tílíkt er, skal eitt sløkkiteppi vera.

5.5 Staðið, har sløkkiútbúnaðurin hongur, skal vera merkt samb. DS 734.

5.6. Hondeldsløkkjarar skulu vera í minsta lagi 6 kg. $CO^2$ - ella pulvursløkkjarar av góðkendum slag samb. DS 2120.
$CO_2$ -sløkkjarar skulu vera av slagnum "typa 55 B". Pulvursløkkjarar skulu vera av slagnum "typa 89 B". Hondsløkkiútbúnaður skal hanga í høgligari hædd yvir gólvinum.

5.7. Víst verður til punkt 7.2 og 7.4.

## 6 Rakstrarreglur

**6.1. Alment.**

6.1.1 Bjargingarop skulu altíð kunna latast upp innanífrá uttan at nýta lykil ella nakað amboð. Sí tó punkt 6.2.3.
Bjargingarop skulu hjá teimum, ið nýta hølini, vera atkomulig uttan nakrar forðingar.

6.1.2 Øki, sum neyðug eru til akførini hjá sløkkiliðnum at koma fram at bygninginum, mugu ikki brúkast til at seta bilar ella annað frá sær, ið kann forða sløkkiliðinum at sløkkja ella at bjarga fólki út.

6.1.3 Rúm til luftskiftisútbúnað, telefontalvurúm (krossfelt), neyðstreymsmotorar og teknikrúm annars mugu ikki á nakran hátt nýtast til goymslu.

**6.2 Rýmingarleiðir.**

6.2.1 Í gong, trappu, túni o.t. skal vera ruddiligt, og hesi pláss og høli skulu ótarnað hava fulla breidd og hava neyðljósskipan, soleiðis at fólk á tryggan hátt sleppa burtur frá

bygninginum og økinum. Í rýmingarleiðum mugu ikki vera nakrar forðingar fyri eldri fólki, sjónveikum ella rørslutarnaðum at sleppa út.
Innbúgv ella annað má als ikki setast í rýmingarleiðina.
Brunamyndugleikarnir kunnu tó, eftir umsókn, loyva, at gongir og tún (ikki trappurúm) verða nýtt til onnur endamál enn ferðsluveg til neyðrýmingar, um so er, at tað ikki tarnar rýmingarleiðini.
Uttandura, næst úthurðum og í rýmingarleiðum, er ikki loyvt at seta bilar og súkklur ella planta ella seta nakað, sum forðar í rýmingarleiðini.
Uttandura rýmingarleiðir skulu vera ruddaðar fyri kava og gler.

6.2.2 Fólk skulu altíð kunna fara út um hurðar, sum eru rýmingarleiðir, uttan at nýta lykil ella nakað amboð. Hurðarnar skulu vera léttar at lata upp við berum hondum við at snara ella toga í eitt handfang. Handfang skulu vera uml. 1 m yvir gólvinum. Pasquilbeslag skal vera uml. 1,6 m yvir gólvi. Á stovnum til brekað mugu handfang á hurðum í rýmingarleiðum ikki fjalast við plastikk-koppum o.t.

6.2.3 Brunamyndugleikarnir kunnu á stovnum fyri brekað, eftir serliga viðgerð, loyva, at bjargingarop og hurðar í rýmingarleiðum standa læst, um so er, at tað er avgjørt neyðugt av øðrum trygdarávum enn brunatrygd.
Í tílíkum førum er tað ein fortreyt:

-at í sovideildum er føst vakt, samb. punkt 1.4,

-at læst vindeygu og hurðar kunnu latast upp við sama lykli og

-at øll starvsfólk hava tílíkan lykil uppi á sær.

6.2.4 Hurðar í rýmingarleiðum, sum ikki verða brúktar dagliga, skulu merkjast NEYÐÚTGONGD eftir DS 734.

6.2.5 Neyðhurðar og rýmingarleiðir mugu IKKI fjalast við gardinum, og tað má á ongan hátt vera ógreitt, at her er neyðhurð ella rýmingarleið. Somuleiðis skulu ÚT-ljós skeltini altíð vera sjónlig, og tey mugu ikki fjalast á nakran hátt.

6.2.6 ÚT-ljósskipanin skal vera tendrað alt samdøgrið.
Brunamyndugleikarnir kunnu loyva, at ÚT-ljósini ikki lýsa altíð, tá ið nóg mikið av dagsljósi er, og tá ið ÚT-ljósini tendra av sær sjálvum, tá ið tað gerst myrkt.

## 6.3 Brandhurðar o.a.

6.3.1 Hurðar millum trappur og gongir og annars allar hurðar, ið sjálvar lata aftur, skulu altíð standa afturlatnar, og tær mugu ikki haldast opnar við kílum, snøri, krókum ella nøkrum, sum forðar teimum at lata aftur. Sí tó punkt 6.3.2. Tann sjálvafturlatandi skipanin, hurðapumpur o.t. má ikki gerast óvirkin. Sí tó punkt 6.3.4.

6.3.2 Hóast ásetingarnar í 6.3.1. kunnu sjálvafturlatandi hurðar haldast opnar við elektromagnetum, sum eru stýrdar av roykvarnarum, ið eru settir upp báðumegin

hurðaropið. Roykvarnarar og útgerð, ið hoyrir til, skal vera góðkend av Brunaumsjón landsins.

6.3.3 Um brunamyndugleikarnir í sambandi við eftirlit koma fram á, at hurðar verða hildnar opnar í ósamsvari við punkt 6.3.2, skal verða kravt, at hurðin verður gjørd sum ásett í punkti 6.3.1.

6.3.4 Á stovnum fyri brekað kunnu sjálvafturlatingarskipaninar takast burtur millum sovirúm og gongir - treytað av:

-at í sovideildum verður sett upp sjálvvirkandi brunaávaringarskipan eins og lýst í punkt 4.2.3, og
-at gongir, longri enn 25 m, verða skilaðar sundur við sjálvafturlatandi, tøttum hurðum.

6.3.5 Brunamyndugleikarnir kunnu krevja, at brandhurðar verða merktar: BRANDHURÐ - SKAL VERA AFTURLATIN. Merkingin skal vera eftir DS 734.

**6.4 Uppsløg.**

6.4.1 Har, sum starvsfólkini eru, skal vera uppslag við í minsta lagi hesi fráboðan:
*"Til starvsfólkið.*
*Rakstrarreglur at fyribyrgja eldsbruna.*
*Verið ansin við eldi.*
*Livandi ljós skulu vera í stakum, sum ikki kunnu brenna. Stakarnir skulu ikki vera úr plastikki, og teir skulu standa trygt. Livandi ljós mugu einans loga í hølum, har tilkomin fólk eru til staðar.*
*Royking er bara loyvd á støðum, ið eru ætlað til hetta endamál.*
*Tubbaksburturkast skal latast í íløt, sum ikki kunnu brenna. Lok skal vera á tílíkum ílati, og lokið skal vera afturlatið.*
*Posar við burturkasti skulu beinast út úr sovideildum, tá ið reingerðin er liðug, og tað skal verða goymt á serstakari ruskgoymslu.*
*Borðdúkar o.t. skal kannast fyri glóðir eftir tubbaksroyking o.a., tá ið slíkt verður burturbeint, so at eldur ikki festur í.*
*El-ovnar skulu vera í minsta lagi 1 m frá tilfari, sum kann brenna. Einki má verða lagt oman á el-ovnar, og teir mugu ikki verða brúktir til at turka nakað á. El-tól skulu sløkkjast við stikkkontaktini.*
*Strúkijørn skulu altíð sløkkjast við stikkkontaktini, eisini í styttri tíðarskeið. Takið altíð stikkið úr kontaktini.*
*Olja-, fernis- boniklútar o.t. kunnu sjálvtendra og skulu latast í íløt við loki, sum ikki kunnu brenna, soleiðis at hetta ikki elvir til eldsbruna.*
*Eldfimur løgur, bensin, petroleum, acetone, spritt o.t. skal brúkast við ansni og einans vera í afturlatnum, góðkendum íløtum.*
*Brandforðandi hurðar skulu vera afturlatnar. Bert hurðar við skipan, sum sjálvvirkandi lata tær aftur, tá ið eldur er í, kunnu standa opnar.*
*Neyðútgongir mugu ikki sperrast ella fjalast. Uttandura skulu rýmingarleiðir haldast reinar fyri kava og gler. Einki má setast í gongir, trappurúm og rýmingarleiðir.*

*Sløkkiamboð skulu standa á sjónskum staði og vera løtt at fáa hendur á."*

6.4.2 Á hotellum og á gistingarhúsum, ið eru til gistingar í styttri tíðarbil, skal við síðuna av alment tilgongdum telefonum vera uppslag um, hvussu boðast skal frá eldsbruna, hvussu staðið eitur, og hvørjum tlf. nr. ringt verður frá. Á hvørjum gistingarkamari skal vera uppslag við í minsta lagi hesari vegleiðing á Føroyskum, donskum og enskum:

*"Vegleiðing frá Brunamyndugleikunum til vitjandi.*

*Kunnið tykkum beinan vegin um, hvar rýmingarleiðirnar eru.*

*Er eldur í:*

*Gerið munnliga vart við vandan.*
*Ringið til Alarmsentralin tlf.: 112.*
*Trýst á brunaávaringina.*
*Latið hurðarnar vera afturlatnar, men IKKI læstar. Verður farið út, skulu hurðar latast aftur, men ikki læsast.*

*Tá brunaávaringin ljóðar, skulu øll fara út. Um tað ikki slepst út gjøgnum trappur og gongir, verið so inni í kamarinum og gevið tykkum til kennar í vindeyganum. Læsið ikki kamarshurðina. (Nýtið ikki elevatorin, tá ið eldur er í)*

*Kunnið tykkum um, hvar sløkkiútgerð er sett.*

*Innanhýsis ávaring er...(ein sirena/klokka úti á gongini...Ringt verður á kamar tygara...)".*

Á hvørjum kamari skal vera yvirlitstekning, ið vísir, hvar "brandtrýst" eru, hvar sløkkiútgerð er, hvar rýmingarleiðirnar eru, og hvar møtistaðið fyri gestirnar, sum eru komnir út, skal verða.

Á hóskandi sjónligum stað skal vera eitt skilligt uppslag, ið vísir mest loyvda fólkatal (tal á gistandi og starvsfólkum), sum brunamyndugleikarnir loyva at vera inni í bygninginum í senn.

6.4.3 Uppsløg, sum tey undir punkt 6.4, skulu tillagast umstøðunum á staðnum. Uppsløg um mest loyvda fólkatal kunnu til dømis orðast soleiðis:

Heiti: XXX-húsið¨

Matr. nr. XXX,N.N, Staðarnavn

Ábyrgd: Navn á viðkomandi persóni

Hesi høli eru undir eftirliti av brunamyndugleikunum
og góðkend við teirri treyt, at í mesta lagi XXX gista í senn.

Dagfesting. xx,xx,xxxx
Brunamyndugleikarnir.

**6.5 Starvsfólkafyriskipan.**

6.5.1 Starvsfólk skulu hava fullan kunnleika um vegleiðingar og rakstrarreglur. Tey skulu vita, hvar sløkkiamboðini eru, og hvussu tey skulu nýtast.

6.5.2 Starvsfólk skulu hava fullgóðan kunnleika um fráboðanar- og ávaringarhættir og mannagongdir. Og starvsfólk skulu hava fullan kunnleika um at skipa fyri at flyta fólk burtur (evakuering) og annars vita um alt, ið her er nevnt.

# 7 Eftirlit

7.1 Fjórða hvørt ár skal ein góðkendur el-installatørur senda brunamyndugleikunum eina váttan viðvíkjandi,

a) at ÚT- og neyðljósskipanin lýkur galdandi krøv.
b) at ávaringarútgerðin er í lagi og virkar við nøktandi styrki og
c) at roykvarnarar og hurðaafturlatingarskipanir á sjálvafturlatandi hurðum eru í lagi og virka.

7.2 Brandslangur í slanguskápum skulu eftirhyggjast í minsta lagi eina ferð um árið.

7.3 Hondeldsløkkjarir, nevndir í 5.4., skulu kannast í minsta lagi eina ferð um árið (manometur, forsegling o.t). Á eldsløkkjarum skal vera spjaldur, ið vísir seinasta eftirlitsdag og -ár, og hvør ið hevur gjørt eftirlitið. Pulvursløkkjarar skulu trýstroynast og kannast gjølla 5. hvørt ár.

7.4 Tað skal javnan kannast:
-at allar ljósperur í samband við ÚT- og neyðljós virka og lýsa,
-at sjálvafturlatingarskipanir virka, at hurðar lata heilt aftur í falsin, og
-at vatn er til slanguskápini, og at slangurnar geva nóg mikið av vatni.

7.5 Brek, manglar ella ólag, ið kemur til sjóndar undir kanningum eftir punktunum 7.1 - 7.4, skulu bøtast og gerast í stand beinan vegin.

## 8 Fyribils gistingarstøð

8.1 Høli ella bygningar, sum ikki eru innrættað til gistingarhús, mugu einans við serstøkum loyvi og treytum frá brunamyndugleikunum nýtast til tílík endamál.

Desember 1998.
**Brunaumsjón landsins.**